Inngangur

Nú MBF komandi ár hevur 30 ár á baki, er tað kanska freistandi at spyrja seg sjálvan, "er tað meiri vit kunnu náa, er meiri eftir at gera." Mítt svar er, at tað er nú vit veruliga kunnu gera átøk, tí eg haldi, at ongantíð hevur verið meiri brúk fyri einum felagsskapi sum MBF enn akkurát nú. Tílíkt arbeiði sum okkara tekur oftast drúgva tíð.

At seta sær mál og at koma ígjøgnum eina tilgongd, sum vit á sinni settu okkum fyri í MBF, tá vit í 2007 fingu landsins myndugleikar at taka undir við at samtykkja ST-sáttmálan um rættindi einstaklinga, ið bera brek, sýntist tá at verða eitt langt og møtimikið átak at fremja. Í august 2009 varð sáttmálin so formliga settur í gildi í Føroyum, og fegnast vit um, at vit fingu fullført hetta so týðandi arbeiði saman við landsins myndugleikum. At vit hava eitt mannarættindaskjal, sum er bindandi, eigur at avspeglast aftur í øllum avgerðum og politikki annars, ið verður førdur í framtíðini.

Nú vit eru á veg inn í eitt nýtt áratíggju , hava vit við sáttmálanum fingið eitt gott "amboð," at arbeiða við frameftir. Við hesum "amboði" eigur øll almenn fyrisiting bæði hjá landi og kommunu at virka fyri, at sáttmálin verður fylgdur, og harvið verða rættindi tryggjað, hvørjum einstøkum borgara, eisini fólki, ið bera brek. Eg eri onga løtu í iva um, at ein sera stór uppgáva hjá MBF er at skumpa undir, so at gongd kemur á arbeiði, at seta sáttmálan í verk í alla almenna fyrisiting, og til hetta krevst eitt áhaldandi arbeiðið. Ein av okkara uppgávum verður at fylgja neyvt við, hvussu okkara grannalond loysa hesa uppgávu og síðani sjálvi vísa á og skipa tiltøk, sum kunnu eggja uppundir at sáttmálan gerst virkin.

Fyri at seta í verk sáttmálan, eitt nú í kommunalari fyrisiting, hava tey í Danmark millum annað útgivið faldarar og skipað skeið, út frá ymsum sjónarhornum, fyri starvsfólki úr viðkomandi fyrisitingum, verða undirvíst og vegleidd um tey fyrilit, sum skulu takast, eitt nú tá talan er um fólk við rørslu-, samskiftis- og menningartarni. Hesi atlit skulu takast so tíðliga sum gjørligt og skulu takast í øllum tænastum og tilboðum, sum verða útboðin til borgaran.

Útbúgving.
Í einum framkomnum landi sum okkara eru vit von við, at samfelagið bara virkar á flest øllum økjum. Ongin setur spurning við tá børn verða skrivað inn í skúla, at tað er nakað serligt, foreldur møta upp við børnunum og so byrja tey í fyrsta flokki. Soleiðis virkar samfelagið bara.
Tá tey sum ung seinri fara á miðnámsskúla ella velja eina handaliga útbúgving, tá er tað bara ein sjálvfylgja, at ein umsókn um upptøku verður send skúlanum. So er spurningurin, er tað sama galdandi fyri børn og ung við breki. Nei so langt frá tí.

ST sáttmálin leggur upp til, at børn við breki skulu fáa tann rætt tey eiga, at fáa undirvísing og útbúgving lagað til teirra tørv.

Við sáttmálanum sum fyrimynd , ið leggur upp til ymiskar útbúgvingar, vildi verið ynskiligt at sæð fleiri langsiktaðar ætlanir innan skúla og útbúgving. Millum annað kundi vit ynskt okkum at sæð, at fleiri ungdómsútbúgvingar verða lagdar til rættis og bodnar út, eitt nú til fólk við menningartarni.

Vit kenna frá Íslandi, at tað ber til. Har hevur verið skipað fyri miðnámsútbúgving fyri menningartarnað í fleiri ár, og somuleiðis hevur verið skipað fyri eini útbúgving sum "pedagogmedhjálpari" á lærda Háskúlanum. Eg haldi tíðin er komin, at vit raðfesta okkara ungdóm

við breki hægri, so at útbúgving er ein rættur og ein sjálvfylgja eins og hjá øllum øðrum ungum í Føroyum.
Eitt annað øki, ið vit síggja stóran tørv verða á, er tilboð til tann ungdóm, ið kemur út úr fólkaskúlanum og duga illa at lesa, skriva og rokna. Á skúlanum hjá Dugna við Áir koma alt fleiri og fleiri umsóknir um upptøku, fyri at menna sær hesar førleikar.
Umráðandi er at fáa fleiri tilboð til henda bólk, so hesi kunnu fyrireikast til eina møguliga miðnámsútbúgving. Hetta er ein sera stórur trupulleiki, sum má takast við størri álvara.

Upplýsing og Tøkni.
Í einum framkomnum samfelagi sum vit eru partur av, eigur rætturin til upplýsing at raðfestast hægri. Tað kemur alsamt meiri tøkni á marknaðin, sum kann hjálpa fólki at samskifta við onnur. Nógv ymisk átøk eru í gongd fyri at gera modernaðu tøknina atkomuliga eisini fyri fólk við breki. Og hetta fer bara at halda áfram, tí vit eru í eini tíð har samskiftistøknin er framtíðin.
Alt okkara lív og okkara dagligi dagur er tengdur av teimum upplýsingum sum koma frá samfelagnum, bæði sum tíðindi, sum lýsingar og frá sosiala netverkinum.

Fólk við breki vilja eisini verða partur av hesi menning og tað kann tøknin eisini at tryggja. Men tá talan er um upplýsing, eru vit í Føroyum tá nóg tilvitaði um, at tíðindi og lýsingar eiga at koma øllum borgarum til góðar?

Public service sáttmálin áleggur Kringvarpinum at teksta og tulka teirra tíðindasendingar og aðrar sendingar. Men vit mugu tíverri staðfesta, at borgarar við breki verða dagliga útihýstir í almenna Kringvarpinum. Vit síggja ongar føroyskar sendingar tekstaðar, bara daggamlar tíðindasendingar tulkaðar og ongar sendingar sum eru gjørdar á tann hátt, at eitt nú fólk við menningartarni kunnu fáa lætt framborin tíðini og so framvegis. Hetta verður snøgt sagt ikki raðfest hjá okkum.
Spurningurin sum vit seta er tí: Vilja vit fáa sendingar í framtíðini, sum er gjørdar soleiðis, at fólk við ymsum breki kunnu fáa gleði av sendingum, eitt nú tíðindi, dokumentar sendingar og so fr.? Fara vit í Føroyum, at liva upp til Public service sáttmálan? MBF fer at fylgja hesum málinum enn neyvari í framtíðini.

At læra um og megna sítt lív við varandi sjúku/breki.
Í bókini "Helsepedagogikk- samhandling om læring og mestring" siga høvundarnir í innganginum m.a: Tað verður sagt um kroniskar sjúkir, at tær kastar ein skugga yvir lívið hjá einum, og sum tú altíð hevur við tær. At megna "mestring" merkir, at tað ber til uppá ymiskar mátar at liva eitt gott og innihaldsríkt lív við skugganum. Víðari siga høvundarnir, at tað kann verða eitt val um fólk brúka sína orku, at harmast um tann miss, ið sjúkan hevur havt við sær, ella um fokus verður rættað ímóti tí møguleikum, sum eru, sum kunnu mennast og sum kunnu geva meiri lívsinnihald og lívsvirði.

Tað hevur í nógv ár verið sera stór ónøgd um vantandi kunning, sum fólk við varandi sjúku fáa, meðan og aftaná tey eru innløgd. Tí er tíðin nú komin til, at raðfesta henda tørv. Vit vita, hvussu umráðandi tað er við einum høgum kunningarstøði fyri, at fólk kann fáa eitt gott og innihaldsríkt lív aftaná at varandi sjúka hevur rakt. Fyri at megna at liva eitt gott og virkið lív, er ein týðandi partur millum annað at fáa góða upplæring um sína sjúku og avleiðingarnar av henni. Ístaðin fyri at brúka orkuna at sláast við tað ókenda, eigur orkan at leggjast í at fáa holla vitan og amboð at virka við, fyri at koma víðari í lívinum. Hetta økið hevur ongantíð verið raðfest hjá okkum, og Heilsuverkið eigur tí at átaka sær at bøta um hesa viðurskiftir.

Vit vita frá okkara grannalondum at tey, tey seinru árini hava lagt stóran dent á at betra hesi viðurskiftir. Aker Universitetssjúkrahús skipaði sum tað fyrsta eina deild á sjúkrahúsinum, ið burturav skuldi taka sær av at læra sjúklingar við varandi sjúku/ breki at liva eitt gott, frælst og innihaldsríkt lív. Nú eru slíkar deildir á flest øllum sjúkrahúsunum í Norra.

Á deildini verður skipað fyri skeiðvirksemi, evnisdøgum, fyrilestrar, einstaklingaundirvísing, vegleiðing, sjálvhjálparbólkar og annað. Øll tiltøkini eru ætla brúkarum/sjúklingum og teirra avvarðandi. Millum 1 og 3 starvsfólk eru sett á deildini og eru tað hesi sum saman við brúkarum, ið hava royndirnar at liva við sjúkuni/brekinum og serkønum starvsfólki frá viðkomandi deildum, sum leggja tiltøkini til rættis og undirvísa.

MBF metir, at hettar er eitt sera átrokandi mál at loysa her hjá okkum. Mín áheitan á Landsstýrismannin í heilsumálum skal tí verða, at taka hettar mál í størsta álvara og seta pengar av til eina skipan sum kann átaka sær hesa uppgávu á hædd við okkara grannalond. Hettar er ikki órealistisk krøv, tí vit tosa ikki um dýrar loysnir.

Sum eg byrjaði at siga, so fyllir MBF 30 ár komandi ár. Vit fara m.a í hesum árinum at leggja orku í at tilrættaleggja tiltøk, ið kunnu skipast í einum 30 ára hátíðarhaldi.
Vit fara sum ein sterkur og viðkomandi felagsskapur framhaldandi inn í okkara arbeiði við góðum treysti.

Leila Solmunde, forkvinna

Ársfrágreiðing 2010

Almannapolitikkur

Bústarviðurskiftir.
Málið um at bøta um bústaðarmøguleikarnar hjá fólki við serligum tørvi hevur nú staðið uppá í nógv ár, uttan at nakað ítøkiligt er hent. Best sum vit seinasta summar hildu at bústaðarpakkin var samtyktur á løgtingi, vísti tað seg at landsstýriskvinnan undir 3. viðgerð í løgtinginum hevði tikið lógaruppskotið aftur. Á fundi við landsstýriskvinnuna í oktober 2009 vísti MBF sína ónøgd við gongdini í hesum máli, og lovaði hon tá, at eitt endurskoðað uppskot vildi verða lagt fyri tingið í hesi setuni, men nú skjótt 1 ár er gingið er enn onki hent.

Sum eina roynd at skunda undir málið avgjørdu vit, at MBF blaðið á heystið 2009 skuldi taka spurningin upp sum eitt tema. Í tí sambandi vitjaðu Leila og Anna Suffía nøkur sambýlir fyri at lýsa umstøðurnar á sambýlinum í blaðnum, og ikki kann sigast annað enn, at hesar vitjanirnar staðfestu, at langt er á mál til ásetingarnar í ST sáttmálanum um atkomu, persónliga virðing og friðhalgað privatlív.

Leingi hevur eisini verið arbeitt við at broyta lógargrundarlagið fyri Húsalánsgrunnin, soleiðis at møguleiki skal gerast fyri, at fólk við serligum tørvi, ið ikki hava fíggjarliga orku at brúka vanliga lánimarknaðin, kunnu fáa lagaliga fígging úr Húsalánsgrunninum. Uppskotið hevur verið til fyrstu viðgerð í tinginum, men tíverri sær út til, at uppskotið fær somu lagnu sum bústaðarpakkin orsakað politiskari ósemju. MBF hevur latið inn hoyringssvar umframt at vit hava verið innkallaði í Trivnaðarnevndina.

Nýggj forsorgarlóg.
Á fyrrnevnda fundi í oktober 2009 við Rósu Samuelsen umrøddu vit eisini arbeiðið við at smíða nýggja forsorgarlóg. MBF er hoyringspartnari í hesum arbeiðinum. Á sama fundi átalaðu vit ætlanina við at leggja eyka avgjald á loyvdu lønarinntøku út yvir fyritíðarpensjónsgjaldið.

Endurvenjing.
Endurvenjingarøkið er málsøkið hjá bæði landsstýrismanninum í almannamálum og landsstýrismanninum í heilsumálum. Hóast álit varð skrivað í 2007 um, hvussu endurvenjingarøkið skal skipast og virka, er stórt sæð onki hent á økinum enn. MBF hevur heitt á Rósu Samuelsen um at seta pengar av á fíggjarlógini fyri 2011 til m.a. at seta ein leiðara/samskipara fyri endurvenjingarøkið so gongd kann koma á endurvenjingina.

Nýggja verjulógin varð samtykt í heyst og fegnast MBF um tað. Tað verður Ríkisumboðið, ið skal umsita lógina og hava bæði Javni og Ríkisumboðið skipað fyri kunnandi fundum hesum viðvíkjandi.

Heilsupolitikkur

Endurvenjing.
Síðani seinasta aðalfund er Aksel Johannesen vorðin nýggjur heilsumálaráðharri. Í tí sambandi hevur MBF havt ein fund við landsstýrismannin. Hettar fyri at kunna um MBF umframt, at vit ynsktu at tosa við hann um ymisk viðkomandi mál.

Á fundinum vístu vit á trupulleikan við vantandi endurvenjingartilboðum. Eisini vístu vit á øll álitini, ið eru gjørd á hesum øki, uttan at nakað er komið burturúr. Vit vístu á, at tað var hansara málsøki at skipa fyri almennari endurvenjing á Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahúsunum umframt serkøna endurvenjing á Landssjúkrahúsinum. Enn eru ongir pengar settir av á fíggjarlógini til hetta økið.Tað einasta sum er tikið stig til higartil er, at nú verður regluliga skipað fyri "Petó viðgerð" fyri Spastikarar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Kunning í samband við viðgerð.
Limafeløgini hava í nógv ár vístá stóra ónøgd viðvíkjandi upplýsing, kunning og undirvísing í samband við viðgerð ínnan heilsuøkið. Hettar er í tráð við tað sum "Sjúklingsnøgdsemiskanningin" frá 2007 av føroyska heilsuverkinum vísir, serliga tá umræður at fyrireika fólk við varandi sjúku og/ella breki til eina broytta tilveru við lívsgóðsku. Higartil hevur tað verið soleiðis, at tað stórt sæð bert hevur verið ymsu limafeløgini, ið hava skipað fyri viðkomandi fyrilestrum og skeiðum fyri persónum við varandi sjúku og/ ella breki og teirra avvarðandi. MBF metir, at øll upplýsing og læring er ein nárttúrligur og sera neyðugur partur av allari viðgerð, og tí halda vit, at øll upp upplæring av sjúklingum og teirra avvarðandi er ein almenn uppgáva.

MBF er gjøgnum norðurlendskt samstarv gjørd vart við eina nýggja skipan við Lærings- og mestringscentrum á norsku sjúkrahúsunum. Hesi centir hava sum uppgávu at skipa fyri ymsum átøkum fyri at sjúklingurin í best møguliga mun kann klára nýggju tilveruna sum varandi sjúkur og/ ella brekaður. Hettar gera tey við m.a. at skipa fyri skeiðum, sjálvhjálparbólkum og undirvísing annars av ymsum slag bæði fyri sjúklingar og teirra avvarðandi. Øll undirvísing byggir á støðuna sjúklingurin er í, og tí eru bæði brúkari og fakfólk við í allari tilrættalegging og undirvísing.

Fyri at seta okkum nærri inn í skipanina við Lærings- og mestringscentrum hava Leila og Anna Suffía verið á studiivitjan á Aker - og Ullevål universitetssjúkrahúsunum í Oslo. Út frá hesi vitjan eru vit sannførdar um, at hettar er ein sera góð og fíggjarliga ikki so tung skipan. Vit hava avtala við landsstýrismannin í heilsumálum, at hann skal fáa eina frágreiðing frá okkum um skipanina. Ætlanin er eisini at greiða frá hesum í komandi MBF blaðnum.

Eisini hava vit umhugsað at skipa fyri einum skeiði/evnisdegi um hesa skipan. Skeiðið vendir sær serliga til leiðslurnar á føroysku sjúkrahúsunum og Nærverkinum. Til skeiðið er ætlanin at fáa fólk úr Norra, ið hava royndir á hesum øki, at koma til Føroyar at kunna um skipanina og um teirra royndir annars. Vit hava havt samband við røktarleiðsluna á Landssjúkrahúsinum um hettar og vísti hon stóran áhuga fyri hesum.

Arbeiðsmarknaðarpolitikkur

Handicapkonsulentur.
Í seinastu ársfrágreiðing greiddu vit frá um at MBF arbeiddi fram ímóti at fáa sett ein handicapráðgeva í starv, men tíverri eru vit ikki komin á mál enn. Næsta stigið verður at finna út av um møguleikan at samskipa handicapráðgevan hjá ALS.

Dugni.
Formaðurin í MBF er valdur í Stýrið hjá Dugna. Stýrið hevur fastar fundir 1 ferð um mánaðin. Endamálið hjá Dugna er at stuðla arbeiðstarnaðum við mennandi virksemi og útbúgving, so hesi hava møguleika at fáa vinnuførleikan aftur.

Dugni hevur fleiri deildir, m.a Endurnýtsluhandil á Hjalla, Kaffibarr á Vaglinum, Skúlan við Áir, Verkstað á Kambsdali, ið tekur ímóti tingum og møblum frá IRF, sum so verða sett í stand og seld í endurnýtsluhandlinum á Kambsdali. Nýggjasta tilboðið sum er komið afturat í Kambsdali er ein avtala við IRF um, at fólk á verkstaðnum gera eitt arbeiði fyri IRF at skilja tað avfallið sum kemur frá teldum o.ø. At tílíkt sum skal burtur, verður skrúvað sundur og skilt í jarn plastikk og glas. Umleið 10 fólk arbeiða hjá Dugna á Kambsdali, sum er tann nýggjasta deildin hjá Dugna.

Verkskúlin í Smiðjugerði í Havn hevur 2 funktiónir. Arbeiðsstað fyri fólk, ið hava eina fyritíðarpensjón og avprøving fyri fólk, har ivi er um teirra arbeiðsførleikar. Har verður mett um teirra arbeiðsførleikar, við at gera "ressursuprofil" og ráðleggingarskrá.

Uppgávan hjá stýrinum er millum annað saman við stjóranum at verða við til at virka fyri, at arbeiðstarnaði fólk fáa góð og mennandi tilboð undir teimum treytum sum Dugni virkar undir.

Útbúgvingarpolitikkur

Uppkvalifisering av lærarum.
Sum vit greiddu frá í síðstu ársfrágreiðing, hevur MBF á ymiskan hátt m.a. á fundum, skrivliga og gjøgnum MBF blaðið víst á vánaligu útbúgvingarmøguleikarnar hjá lærarum, ið skulu taka sær av børnum við serligum tørvi. Læraraútbúgvingin tekur ikki atlit til undirvísing til børn við serligum tørvi, og heldur ikki hevur nøkur eftirútbúgving verið, ið setur fokus á hetta økið.

Seinasta árið hava vit tó varhugan av at okkurt hendir á økinum. Nú um dagarnar fingu fyrstu handað prógv í lesivegleiðing, so vónandi kann tað koma teimum til góðar, ið hava trupulleikar við at læra at lesa.

Men enn sakna vit nakað ítøkiligt um eftirútbúgving av lærarum til sernámsøkið og at fáa sernámsfrøðina við inn í grundútbúgvingina

Rættindi

ST- sáttmálin um rættindi einstaklinga, ið bera brek.
Tilgongdin at fáa ST. sáttmálan um rættindi einstaklinga, ið bera brek samtyktan á Føroya Løgtingi tók sløk tvey ár. Arbeiðið byrjaði tann 29. september 2007 og 23. august í 2009 fekk hann formliga gildi í Føroyum. Føroya Løgting tók eisini undir við fylgisáttmálanum, ella sokallaðu protokollini. Hesin fylgisáttmáli gevur borgarum, ið til fánýtis hava troytt møguleikarnar í egnum landi, rætt til at kæra beinleiðis til ST. Danmark hevur tíverri ikki tikið undir við fylgisáttmálanum og inniber tað ríkisrættarliga ikki kann setast í gildi fyrr enn Danmark hevur samtykt fylgisáttmálan.

Síðsta tiltakið MBF hevur skipað fyri í samband við ST sáttmálan var ráðstevnan í oktober 2009. Evnið á ráðstevnuni var Sektorábyrgd. Vit valdu hettar evni av tí at hettar framvegis er eitt ókent fyribrigdi og at sektorábyrgd er sera viðkomandi partur av ST sáttmálanum.

Til ráðstevnuna høvdu vit fingið nógvar áhugaverdar persónar at halda fyrilestur. Mogens Wiederholt, fyrrverandi stjóri á Center for Ligebehandling af Handicappede og núverandi stjóri í danska Spastikarafelagnum greiddi frá, hvussu ST sáttmálin kann nýtast handicappolitiskt og hvussu sáttmálin spælir saman við og styrkir sektorábyrgdina.
Onnur, ið høvdu framløgu vóru Almannastjórin Petra J. Joensen um sektorábyrgd og almannaverkið, Jákup Foldbo deildarleiðari í Runavíkar kommunu, um kommunala økið og sektorábyrgd, Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna í Ráðnum fyri brekað, um hvussu vit røkka sektorábyrgdini, Bergljót av Skarði avvarðandi um, hvussu tað er at liva við breki í føroysku skipanini og Hallbera F. West um meginregluna um kompensatión, við atlit til føroysk viðurskiftir. Ráðstevnan eydnaðist væl og umleið 150 fakfólk , lands og kommunalpolitikarir og onnur áhugaði tóku lut.

Nú er sáttmálin so samtyktur, men ikki kann hvílast á hesum sigrinum og halda at nú loysa tingini seg av sær sjálvum. Tað liggur nú eitt stórt arbeiði fyri framman at fáa sáttmálan settan í verk í alla okkara fyrisiting. Vit í MBF eru tilvitað um, at tað liggur ein stór uppgáva at skumpa undir at fáa sáttmálan at virka so at sáttmálin verður eitt veruligt arbeiðsamboð fyri allar føroyingar, hvørjum einstøkum fólki við breki at gagni.

Frítíð

Suðuroy sum ferðamál.
Við fíggjarligum stuðli frá ”EIK” hevur MBF í farna ári arbeitt við at fáa Suðuroynna sum vælegnað ferðamál fyri rørslutarnað.

Í tí sambandi hava Leila Solmunde, formaður í MBF og Eileen Sandá, ferðavinnusamskipari í Suðuroynni ferðast runt oynna fyri at gera eitt tilmæli til kommunur og teimum sum bjóða út ferðavinnu, um hvat skal til fyri at náttúrðufyribrigdi, søvn, gistingarmøguleikar, matstovur o.a. kunnu gerast atkomulig.

Tilmælini vórðu síðani øll savnaði í einum faldara, ið varð almannakunngjørdur á almennari samkomu á Seglloftinum 22. apríl. Á samkomuni hevði Leila eina framløgu, har hon legði fram úrslitið av arbeiðinum. Harumframt hevði Søren Bruun, stjóri í Suðuroyar Sparikassa, framløgu um týdningin at kunna ferðast hóast rørslutarn og Tróndur Enni luttók við tónleiki og sangi. Væl av

fólki møttu upp, serliga vóru vit fegin um, at nógvir kommunalpolitikarar møttu. Tað sýntist sum at fólk vóru vælnøgd.

Atkoma

Kunngerð og lóg um atkomu.
MBF hevur nú í nógv ár arbeitt fyri at fáa heimildargrundarlagið fyri atkomuviðurskiftini í rætt lag. Higartil hevur tað verið so, at onki lógargrundarlag hevur verið fyri atkomu, hvørki í samband við vegagerð ella bygningar. Nógvir fundir og skriv hava verið við skiftandi landsstýrismenn á økinum, uttan at tað hevur givið nakað úrslit. Men nú sær út til at nakað hendir á økinum.

Í farna ári varð ein Kunngerð um atkomu samtykt. Kunngerðin tekur støði í Lóg um byggi- og býarskipan fyri Tórshavnar kommunu, og í januar mánaða høvdu vit uppskot til løgtingslóg um bygging til hoyringar. So vónandi verður byggilógin samtykt innan ikki alt ov langa tíð. Tá byggilógin verður samtykt verður heimildargrundarlagið fyri kunngerðini um atkomu flutt frá Lógini um byggi- og býarskipan fyri Tórshavnar kommunu til Lógina um bygging. Tá byggilógin verður sett í gildi verður møguleiki at kæra avgerðir viðvíkjandi atkomu.

Enn er tað MBF, ið hevur eftirlit viðvíkjandi atkomu til nýbygningar, ið skulu hava almennan fíggjarligan stuðul. Men tá byggilógin verður samtykt, verður hendan uppgávan flutt til ein alment settan bólk at umsita.

Norðurlendskt samstarv

HNR.
MBF er limur í HNR, Norðurlendska handicapráðið. Ráðið hevur 2 fundir um árið, ein um várið og ein um heystið. Seinastu 3 árini hevur ráðið arbeitt nógv við spurningum viðvíkjandi ST sáttmálanum, og hevur hettar verði til stóra nyttu til okkara arbeiði í Føroyum hesum viðvíkjandi. Annars er ráðið farið at taka ymisk evni upp til viðgerðar. Evni á fundinum í vár var Rehabilitering. Har gjørdist tað greitt fyri okkum at hini norðanlondini eisini hava nógvar trupulleikar á hesum økinum at dragast við.

NHR.

NHR, Norðisk handicappolitisk råd er ein ráðgevandi felagsskapur, sum m.a. setur handicappolitikk á dagsskrá hjá Nordisk Ministerråd. Ráðið virkar við støði í ST sáttmálanum um rættindi einstaklinga, ið bera brek.

Norðurlondini hava hvørt 3 umboð í Nordisk Handicappolitisk Råd, eitt politiskt umboð, eitt umboð fyri Handicapfeløgini og so eitt umboð fyri politisku aðalráðini. Føroyar, ið saman við hinum sjálvstýrandi umráðunum Grønlandi og Álandi, hava bert eitt umboð.
Almannaráðið hevur valt Leilu Solmunde, forkvinnu í MBF, at umboða Føroyar.

Ráðið virkar fyri at styrkja prinsippið um sektorábyrgd og fyri at hugtakið “Design for Alla” ella sum tað eitur á Føroyskum “Algilt snið” verður eitt hugtak sum skal galda í øllum tilboðum sum verður boðin út til borgaran.

Fyriskipanarlig viðurskiftir

Limastøðan.
Tað eru nú 24 limafeløg í MBF. Limatalið í limafeløgunum er nú umleið 6000 . Onki felag hevur í ár søkt um limaskap, men vit vita um fleiri feløg, ið eru undir stovnan og sum ætla at søkja um limaskap í MBF

Starvsnevndin.
Starvsnevndin hevur dagligu umsitingina av MBF um hendi og verða øll viðkomandi mál tikin upp í starvsnevndini til viðgerðar. Starvsnevndin hevur umleið 1 fund um mánaðin, tó undantikið juli og desember mánað. Í ár hava 10 starvsnevndarfundir verið. Síðani seinasta aðalfund hava 10 fundir verið hildnir.

Síðani aðalfundin í 2009 hava hesi mannað í starvsnevndina:
Leila Solmunde, formaður
Sigrun Mohr, form. í Alzheimerfelagnum, umboðandi Sálarlig/neurologiska bólkin, næstformaður
Kristianna Rein, form. í Diabetesfelagnum, umboðandi Medisinska bólkin
Ruth Thomsen, form. í Blindafelgnum, umboðandi Rørslubólkinum
Bjørg Hovland Hjelm, ráðgevi í Deyvafelagnum, umboðandi Deyvafelagið

Varaumboð hava verið:
Sofus Vágsheyg frá Heilafelagnum, Majgunn Erlandsdóttir Nolsøe frá Psoriasisfelagnum, Óli Wolles frá Javna og Jákup Danielsen frá Felagnum fyri hoyribrekað.

Skrivstovan.
Leila Solmunde hevur verið formaður í Meginfelag teirra brekaðu seinastu 6 árini. Á skrivstovuni arbeiða Anna Suffía Durhuus, ið er dagligur leiðari, og Diana Thomsen, ið er sett hálva tíð sum skrivstovufólk. Kirstin Vilhelmsen arbeiðir sum reingerðarfólk 7 tímar um vikuna.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víttfevnandi. Frá vanligari umsiting til umsiting av Serflutningsskipanini og avlamisskeltum, frá hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð til fundarvirksemi við limafeløg, stovnar og politiskar myndugleikar. Í 2008 lá stóra arbeiðasbyrðan á at fáa ST sáttmálan samtyktan meðan tað í 2009 hevur verið arbeitt við at fáa implementerað sáttmálan í føroyska samfelagið.

Nógv fólk venda sær til MBF við fyrispurningum av ymsum slag. Men so vítt gjørligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini, at limafeløgini oftast eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini

Fíggjarviðurskiftir.
Stuðulin yvir fíggjarlógina var í 2009 1, 5 mill., og hevur tað verið henda upphædd síðani 2008. Tað sær út til at vera trupult at fáa hækka játtanina soleiðis sum fíggjarstøðan í Føroyum sær út í løtuni.

Av tí at tað er so trupult at fáa hægri stuðul hava vit roynt aðrar vegir fyri at skaffa feløgunum lættari fíggjarligar og fyrisitingarligar umstøður. Avtala er gjørd við “Bera” um at senda limabløðini út fyri umleið ein helvtarprís í mun til tað, goldið hevur verið til postverkið, umframt at “Bera” átekur sær at pakka bløðini. Viðkomandi limafeløg hava havt fund við “Bera” um, hvussu samstarvi millum “Bera” og limafeløgini skal fara fram í hesum sambandi.

Arbeitt hevur eisini verið við at vita um møguleiki at fáa avsláttur uppá lýsingar, ið limafeløgini hava í bløðum, ÚF og SVF. Byrja var við at fáa upplýsingar frá feløgum um, hvussu nógvur peningur var nýttur til lýsingaátøk í 2008. Men tað vóru bert nøkur fá feløg, ið meldaðu aftur, so mett var ikki at tað var munagott grundarlag at byggja á. Um áhugi framvegis er til staðar, royna vit møguliga aftur seinri í ár.

Býtislykilin.
Smb. viðtøkunum hjá MBF skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MBF er frádrigin. Býtislykilin seinastu árini hevur verið soleiðis: Av játtanini uppá 1, 5 mill.verða 2/3 settir av til raksturin hjá MBF og 1/3 fer til at býta millum feløgini. Av sínum parti letur MBF 50.000 kr. og limafeløgini 150.000 kr. til "Tiltaksgrunnin". Úr Tiltaksgrunninum hava so øll feløgini møguleika at søkja um stuðul til eitthvørt tiltak.

Parturin hjá limafeløgunum hevur so, aftaná at 150.000 kr. eru settar í Tiltaksgrunnin, verið 350.000 kr., og eru tær býttar soleiðis millum feløgini: 1/3 verður býttur javnt millum feløgini og restin verður býtt út í mun til limatalið í teimum feløgunum, ið ikki sjálvstøðugt standa á fíggjarlógini. Í Tiltaksgrunnin verður so eisini goldið 25.000 kr. í stuðli frá EIK.

Lógararbeiði.
Í farna ári hava vit havt 12 lógir, kunngerðir og álit til ummælis. Hettar hevur verið:
- Lógarbroyting, kunngerð og vegleiðing um markamót í samband við stuðul til hjálparráð, - lóg um heilsutrygd, - leigulógin, - kunngerð um stuðul til heiligvág, - kunngerð um atkomuviðurskiftir, - lógarbroyting í samband við endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, - kunngerð um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, - fleiri kunngerðir í samband við Sinnissjúkralógina og kunngerð um sjúklingakærunevnd í hesum sambandi, - lóg um at fyrisita ogn hjá aldursómyndugum og persónum undir verju og - álit um endurskoðan av tilboðum og skipanum til børn, ung og familjur við serligum tørvi.

At arbeiða við hoyringssvar til lógarsmíð krevur nógva orku. Vit hava skipað tað soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, ið MBF fær til ummælis, verða sendar út til øll limafeløgini. Feløgini hava so møguleika at gera sínar viðmerkingar, kanska serliga um tað eru lógir, ið eru viðkomandi fyri júst teirra felag, tað hevur tó í flestu førum verið onki ella bert einstøk feløg, ið hava sent okkum nakrar viðmerkingar. Í einstøkum førum fáa vit serkøna hjálp frá løgfrøðingi.

Hoyringssvarini eru at finna á heimasíðuni hjá MBF.
Eisini hava vit verið á fundi í almannamálaráðnum viðvíkjandi arbeiðnum sum er í gongd við at gera eina nýggja forsorgarlóg. Í hesum arbeiðinum er MBF hoyringspartnari.

<u>Fundir o.a.</u>

Formansfundir.
Formansfundirnir er eitt fakligt forum har formenninir í limafeløgunum hittast til sínámillum kunning. Í farna ári hava 2 fundir verið, ein í nov. 2009, ið Kristianna Rein skipaði fyri og ein í februar, har fólk frá fíggjarmálaráðnum greiddi frá um uppskotið til nýggja pensjónsskipan. Á báðum fundinum verður kunnað um, hvat MBF og limafeløgini takast við.

Undirvísing.
Formaðurin í MBF er javnan á ymsum skúlum m.a. Studentaskúlanum í Kambsdali og Heilsuskúlanum á Tvøroyri. Eisini eru tað nógvir næmingar og lesandi, ið venda sær til MBF í samband við verkætlanir og aðrar uppgávur sum viðger spurningar í samband við brekøkið.

Ein sjúkrasystralærari úr Norra hevur í árinum verið á studiivitjan hjá MBF. Hennara serligi áhugi var rehabilitering og ynskti hon at fáa nakað at vita um, hvørji tilboð vóru á hesum øki í Føroyum.

Aðrir fundir.
Formaðurin og dagligi leiðarin í MBF sita sum umboð í ymsum ráðum, nevndum og arbeiðsbólkum, og leggur tað upp til ymiskt fundarvirksemi. Nevnast kann fundarvirksemið hjá formanninum í Ráðnum fyri brekað og ALV, har nógvir fundir eru og Happadráttargrunninum, og fundarvirksemið hjá dagligu leiðarum í samband við Teknmálstulkatænastuna og Serflutningsskipanina. Eisini hava vit verið á fundum í samband við ymisk mál og tiltøk.

MBF blaðið.
Seinasta árið eru 2 bløð útkomin. Blað nr. 1/2009 snúði seg um førleikakrøv til fólk, ið skulu vera um fólk við serligum tørvi. Blað nr. 2/2009 snúði seg um ráðstevnuna, um manna- og javnrættindi hjá fólki, ið bera brek og um bústaðarmøguleikarnar hjá fólki við serligum tørvi.

Tað er Rit&Rák við Torfinn Smith, sum skrivar flestu greinarnar, og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið. Upplagið er uppá 1500 eintøk. EIK banki hevur nú í 2 ár sponsorerað blaðið við 50.000 kr. árliga. EIK hevur frá 2010 sett stuðulsupphæddina niður til 25.000 kr.

Heimasíðan.
Týdningurin at hava eina aktiva heimasíðu, er stórur í eini tíð har nógv fólk søkja sær vitan gjøgnum internetið. Nýggja heimasíðan hjá MBF er ein góður boðberi fyri mál, ið vit kunnu gera viðmerkingar til, og til útlendsk tíðindi sum kunnu verða viðkomandi hjá okkum.
Vit hava vanliga frá 20 til 80 vitjanir um dagin. Summar dagar hava vit 200- 300 vitjanir, og er tað einamest tá skúlar og lærustovnar skulu brúka tilfar til uppgávur og annað, sum snýr seg um brek.

Tað er ein sera umfatandi og drúgv arbeiðsuppgáva at umsita heimasíðuna. Tað er Leila Solmunde, ið umsitur heimasíðuna hjá okkum. Limafeløgini kunnu senda okkum boð um teirra fundir, sum vit so leggja út á heimasíðuna undir tiltøk.

Tænastur, Serflutningsskipanin og Handicapskjeltir.
MBF umsitur Serflutningsskipan Landsins. Endamálið við skipanini er at veita hjálp til fólk, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól. Skipanin umfatar Tórshavnar og Klaksvíkar kommunu, umframt allar kommunurnar í Eysturoyar og Sunda kommunu. Tilgongdin til skipanina er alsamt vaksandi. Higartil hevur MBF visiterað til skipanina, men ætlanin er, at kommurnar sjálvar skulu átaka sær hesa uppgávu. Higartil er tað bert Tórshavnar og Vestmanna kommunur, ið hava átikið sær uppgávuna.

Serflutningsskipanin verður sera nógv brúkt, soleiðis at skipanirnar í Tórshavn og Eysturoynni eru um at gerast ov lítlar, soleiðis at tær hava ringt við at nøkta tørvin. Stýrið í Serflutningsskipanini er

tí farið í gongd við at finna út av, hvussu skipanin virkar í dag. Um hvussu nógv eru í skipanini í dag, hvussu stórur tørvurin er, og um skipanin nøktar tørvin, ið er í dag.

MBF umsitur eisini handicapskeltini. Umsóknir eftir handicapskeltum er alsamt vaksandi. Orsøkin til vaksandi talið av umsóknum hongur helst saman við økta talið av bilum, og tískil gerast møguleikarnir at parkera tætt við verri. Nógvar av umsóknunum hanga saman við vánaligu parkeringsviðurskiftini á Landssjúkrahúsinum. Arbeitt verður í løtuni við at gera greiðari mannagongdir í samband við tillutan av skeltum.

Sum umstøðurnar eru í dag, virkar skipanin við handicapparkering ikki við heimild í nakrari lógarheimild, men tillagar seg ístaðin eftir donskum reglum eftir besta førimuni. Hettar gevur MBF trupulleikar í dagligu umsitingini, so tí hava vit sett okkum fyri at fáa hesi viðurskiftir í rætt lag. Fyri at koma í gongd hava vit havt fund við ábyrgdarhavaran fyri ferðslupolitiið. Síðani hava vit sent eina áheitan til Innlendismálaráðið um at gera broytingar í ferðslulógini, sum heimilar frávik vegna brek í ymsum viðurskiftum og við støði í hesum at gera eina kunngerð at dagføra allar mannagongdir, leiðbeiningar og kunningartilfar annars.

Fyri at seta okkum inn í viðurskiftini hesum viðvíkjandi hava Diana Thomsen og Anna Suffía Durhuus verið á vitjan hjá DH (Dansk Handicapforbund), ið umsitur skipanina í Danmark. Hendan vitjan gevur okkum eitt gott grundarlag fyri at arbeiða víðari við málinum

Húsið.
Breiðbandsskipan er nú løgd inn í MBF húsið til limafeløgini at binda seg í. Eisini leigarar av fundarhølinum hava nú møguleika at brúka breiðbandssambandið.

Steinflísar eru nú lagdar í túnið frammafyri úthurðina. Nakað av trupulleikum hava verið við nýggju automatisku úthurðini, men nú er hon í lagi.

Av tí at so nógvar broytingar eru gjørdar í kjallarahæddini, eru ljósviðurskiftini so við og við vorðin ónøktandi, serliga hvat viðvíkur kontaktum. Hesi viðurskiftir verða nú fingin í rætt lag.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Ráðið fyri brekað.
Formaðurin í MBF, Leila Solmunde er føddur limur í RfB. Sum varalim fyri hana situr Anna Suffía Durhuus, dagl. leiðari í MBF. Sum umboð fyri MBF situr harumframt Uni Rasmussen frá Blindafelagnum og Óli Wolles frá Javna sum varaumboð. Barbara á Tjaldrafløtti er formaður í Ráðnum. Í ráðnum sita harumframt Veronika Petersen Føroya Kommunufelag, Steinbjørn Jacobsen fyri Kommunusamskipan Føroya, Rúni Rasmussen fyri Løgmansskrivistovuna og Jan Simonsen fyri AHR.

Happadráttargrunnurin.
3 limir manna Happadráttargrunnin og eru tey: Leila Solmunde, formaður í MBF, Barbara á Tjaldrafløtti, formaður í Ráðnum fyri Brekað og Eyðun Mohr Hansen, ið umboðar AHR er formaður í grunninum. Varalimir eru Doris Hansen og Kristianna Rein.

"Ljóðbøkur".

Endamálið við Ljóðbókatænastuni er at skipa fyri ljóðbókaútgávu á føroyskum máli til blind og lesitarnað fólk í øllum aldri.

Margretha Næss hevur sitið sum MBF umboð í Ljóðbókanevndini í nógv ár, og virkar hon dagliga sum samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkur. Í ljóðbókanevndini sita umframt Margretu Næss, Tórunn Sumberg fyri Blindastovnin, Sólvør Henriksen fyri Landsbókasavnið, Malan Hilmarsdóttir fyri Býarbókasavnið, Solveig Debess fyri Landsmiðstøðina og Ruth Thomsen fyri Blindafelagið.

"Ljóðbøkur" hevur eina heimasíðu www.ljodbokur.fo, har ein sær hvørjar ljóðbøkur eru komnar út.

Ráðið fyri ferðslutrygd.
Herit Joensen, Vestmanna situr sum MBF umboð og hevur hon verið umboðað í ráðnum í nógv ár.

FUR,- Føroya Ungdómsráð.
MBF hevur 2 umboð í FUR. Umboðini hjá MBF eru Jákup Danielsen úr Nýrafelagnum og Ása Sunadóttir úr Epileptikarafelagnum

Teknmálstulkatænastan.
Endamálið hjá Teknmálstulkatænastuni er at taka sær av samskiftinum millum teknmáksbrúkarar og hoyrandi.

Formaðurin í MBF er føddur kassameistari í Teknmálstulkatænastuni, men í løtuni hevur formaðurin latið henda sess til Annu Suffíu Durhuus, dagligur leiðari í MBF.

Serflutningsskipanin.
Annu Suffíu Durhuus, dagl. leiðari í MBF situr sum MBF umboð í stýrinum fyri Serflutningsskipanini. Umframt hana situr 1 umboð fyri KSF, 1 fyri FK og 1 umboð fyri AHR.

Sjúklingaráðið.
Tey 3 Sjúkrahúsráðini eru nú umskipaði til 1 Sjúklingaráð fyri allar Føroyar. MBF hevur ikki beinleiðis umboðan í Sjúklingaráðnum, men limir úr limafeløgunum í MBF hava møguleika at gerast limir í ráðnum. Í løtuni sita umboð frá Giktafelagnum, Sinnisbata, Diabetesfelagnum og Javna í ráðnum.

Sambært lógini er uppgávan hjá sjúklingaráðnum at vera ráðgevandi hjá landsstýrismanninum í málum, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar. Ætlanin er, at ráðið skal geva landsstýrismanninum eitt breiðari avgerðargrundarlag, við at ráðgevingin kann vera øðrvísi enn tann, hann fær frá fakpersónum í heilsuverkinum.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin.
Sambært kunngerðini um psykiatrisku sjúklingakærunevndini skal MBF tilmæla annan av teimum triðmum limunum í kærunevndini. Psykiatriska sjúklingakærunevndin skal taka avgerð í kærumálum um tvingsilsviðgerðir

Fyri MBF situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og leiðari av Sambýlinum í Eysturstræti og sum varalimur situr Marjun Holm, avvarðandi og skúlastjóri á Argja skúla.